# Vilja víðka um NAMMCO



*Hetta er 19. árligi fundurin hjá NAMMCO, sum hesaferð verður hildin í Norðurlandahúsinum*
Mynd: Álvur Haraldsen

**Norðuratlantiski felagsskapurin umboðar eitt stórt øki, men hevði fingið munandi størri tyngd, um fólkarík lond sum Rusland og Kanada eisini komu upp í NAMMCO**

Leo Poulsen

NAMMCO er ein felagsskapur í Norðuratlantshavi, ið umsitur hval og kóp.

– Tankin var at hava eitt forum, har londini við felags áhugamálum kundi hittast at tosa um viðurskifti, við áhuga fyri hvali og kópi, sigur Kate Sanderson, sum hevur umboðað Føroyar í hvalahøpi gjøgnum mong ár.

Hon sigur, at londini í útnorði vóru ørkymlað av, at IWC ikki kundi koma fram til eina semju um nakað sum helst.

– Ynskið var, at NAMMCO skuldi yvirtaka tær uppgávur, sum IWC ikki megnaði, og tað er framvegis føroyska ynskið, sigur Kate Sanderson.

Londini í NAMMCO eru kortini framvegis limir í IWC, og royna framvegis at gera sína ávirkan galdandi har.

– Fiskiveiðan verður umsitin lokalt, og tað ynskja vit eisini, at veiðan eftir hvali og kópi verður, sigur Kate Sanderson.

NAMMCO hevur sína egnu vísindanevnd, og limalondini kunnu so senda spurningar til hesa nevndina.

– Tað ber til at biða um útgreiningar og stovnametingar frá nevndini, so koma tilmælini aftur til fundin frá teimum báðum undirnevndunum, ein fyri hval og ein fyri kóp, og síðani verður hugt nærri eftir, hvat kann gerast í mun til umsitingina av hvali og kópi, sigur Kate Sanderson.

## Rusland og Kanada

Fundurin hevur millum annað avgjørt ein drápshátt fyri bæði kóp og hval, og hvussu hetta fer fram í ymsu londunum.

– So fundurin er eitt gott forum at deila royndir hjá ymsu veiðifólkunum og ymsu londunum, sigur Kate Sanderson.

Eisini verður skipað fyri einari eygleiðaraskipan, har fólk eygleiða veiðihættirnar í ymsu NAMMCO londunum.

– Vit hava í fleiri ár havt persónar í Føroyum, sum eygleiða grindadráp og háttin, vit drepa grind, sum síðani verður fráboðaður aftur til NAMMCO, sigur Kate Sanderson.

Tað er eingin loyna, at størri felagsskapurin er, størri tyngd hevur hann, og serliga Føroyar hava gjørt sítt ítarsta at økja um limatalið.

– Tað vóru vit, sum tóku stig til, at kópaveiðimaðurin úr Kanada í ár var gestarøðari á fundinum, tí vit hildiu, at tað var ein máti at gera luttøkuna hjá Kanada meira virkna, og hettar ein máti at vísa Kanada, at vit fegin vilja hava teir meira aktivt við og ikki bert sum eygleiðarar, sigur Kate Sanderson.

Sama er galdandi fyri Rusland, men við Japan er støðan eitt sindur øðrvísi, tí talan er um ein felagsskap í Norðuratlantshavi.

– Men Japan hevur altíð víst áhuga fyri okkara arbeiði, og teir hava í sínum lag eisini roynt at stovna ein felagsskap í sínum egna umhvørvi við sama endamáli, tó at tað ikki hevur gingið eftir vild, sigur Kate Sanderson.

Hon sigur, at stórur dentur verður lagdur á, at fáa serliga Kanada og Rusland at koma upp í felagsskapin av álvara.

– Bæði londini taka lut í vísindaliga arbeiðinum í felagsskapinum, so vónandi gerast tey fullir limir innan stutta tíð. Tað skal ikki so nógv til áðrenn tað hendir, og so kunnu tey verða við til at gjalda limagjaldið – tað høvdu vit einki havt ímóti, sigur Kate Sanderson.

---

# Umhugsa leiklut í IWC

**Limalondini í International Whaling Commission standa meira spjadd nú enn nakrantíð, og tí umhugsar landsstýrið sín leiklut sum partur av donsku sendinevndini**

Leo Poulsen

19. árligi NAMMCO fundurin varð í gjár settur í Norðurlandshúsinum, og tí setanarrøðu síni segði Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, at eftir seinasta fundin í IWC í Agadir fara Føroyar at umhugsa sín leiklut sum partur av donsku sendinevndini í felagsskapinum.

– Spurningurin er, hvussu leingi vit skulu lata okkum lynda at standa á síðulinjuni og síggja grundleggjandi altjóða prinsippir verða kveistrað til viks, segði Jørgen Niclasen.

Hann tosaði í setanarrøðuni um økissamstarv.

– Føroyar stuðla fult út økissamstarvi. Í veruleikanum halda vit, at hetta er einasti háttur at samstarva á altjóða støði um eina burðardygga skipan av havsins tilfeingi, íroknað hval og kóp, segði Jørgen Niclasen.

Hetta var eisini grundarlagið undir NAMMCO, tá felagsskapurin varð settur á stovn í 1992, at umsita hvala- og kópaveiði í Norðuratlantshavi.

– Tað er heldur eingin loyna, at ørkymlandi arbeiðslagið í IWC var ein týðandi ors.k til stovnanina av NAMMCO, ið er ætlað sum eitt alternativ til IWC, eisini tá tað snýr seg um stórhvalaveiði, segði Jørgen Niclasen.

Hann ásannar tó, at IWC ikki er komið eitt fet nærri einari loysn á handilsligari stórhvalaveiði, hóast hetta skuldi verið høvuðsuppgávan hjá felagsskapinum.

## Hvat nú?

Uttanríkisráðharrin var rættiliga bersøgin í røðu síni, tá tað kom til Føroya leiklut í IWC.

– Fyri at siga tað sum tað er, so síggi eg onga framtíð í IWC eftir seinasta fundin í Agadir. Vit fara nú at umhugsa okkara framhaldandi leiklut í donsku sendinevndini hjá IWC. Vit ynskja ikki longu at standa á síðulinjuni ár eftir ár og síggja grundleggjandi altjóða prinsippir verða kveistrað til viks. Og vit finna okkum ikki í at spurnartekin framhaldandi verður sett við okkara rætt til eina burðardygga veiði í okkara egna sjóøki, segði Jørgen Niclasen.

Hann helt fram og vísti á mongu líkheitirnar, sum veiðitjóðir í Norðuratlantshavi hava.

– Vit eru ikki altíð samd um smálutirnar, men tað er av týdningi at vit eru samd um grundleggjandi prinsippini í okkara samstarvi. Tað er IWC ikki, segði Jørgen Niclasen.

Uttanríkisráðharrin fegnaðist eisini um áhugan, sum Kanada, Rusland og Japan vístu NAMMCO. Eisini nevndi hann skjótu tøknina, sum kann nýtast og misnýtast.

– Seinastu tíðina hava vit sæð eina bylgju av skeivum upplýsingum um grindadráp spreitt gjøgnum internetið. Tað tykist alt ov lætt at geva skeivar upplýsingar til eitt heilt nýtt ættarlið gjøgnum internetið, segði Jørgen Niclasen millum annað í setanarrøðu síni í gjár.



*Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, setti 19. NAMMCO fundin, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum hesa vikuna*
Mynd: Álvur Haraldsen